gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Kasparov fyrireikað seg væl

**Hann hevur fingið 400 talv hjá føroysku landsliðnum sendandi, so hann kann verða væl fyrireikaður til talvdystin sunnudagin**

KONGURIN
*Eyðun Klakstein*


*Kasparov er heimsins sterkasti telvari, og hann hevur júst vunnið talv ímóti heimsmeistaranum. Í Føroyum er millum annað dystur ímóti talvlandsliðnum á skránni*

Í gjár kom kongurin til landið.

Talan er ikki um bókstaviliga kongalig vitjan, men hinvegin um heimsins mætasta telvara, Garry Kasparov.

Maðurin, sum er telvarin fram um allar aðrar í heiminum, vitjar í Føroyum um vikuskiftið, og á skránni eru tveir dystir.

Kasparov hevur fyrireikað seg væl til Føroyaferðina, tí fyri nøkrum vikum síðani bað hann formannin í talvsambandinum um at fáa sendandi so nógv talv sum gjørligt hjá teimum, sum telva á føroyska landsliðnum.

Orsøkin til hetta er, at Kasparov telvar ímóti landsliðnum í Norðurlandahúsinum, og hann ætlar sær at verða væl fyrireikaður til hesa uppgávuna.

– Eg var eitt sindur kløkkur, tá hann bað um at fáa tey mongu talvini hjá landsliðnum, men í grundini er hetta ikki so løgið. Kasparov er kendur fyri at verða væl fyrireikaður, og tað er eisini tí, at hann er heimsins besti telvari, sigur Rani Nolsøe, formaður í Talvsambandi Føroya.

## Tvær stórar uppgávur

Kasparov fer at halda norðoyastevnu leygardagin. Hann vitjar í Klaksvík, og á skránni er eisini simultantalv ímóti 25 telvarum.

Um tað viðrar, verður hetta tiltakið í Vágstúni. Verður veðrið ikki til vildar, verður tað flutt í Skálan.

Sunnudagin er dysturin ímóti sterkastu føroysku telvarunum á skránni. Hesin dysturin verður í Norðurlandahúsinum í Havn.

Kasparov fær 90 minuttir tilsamans til øll talvini, meðan telvararnir á føroyska landsliðnum fáa 60 minuttir hvør.

– Hetta verður ein spennandi dystur, tí um øll talvini gerast drúgv, so kann tað verða ringt hjá Kasparov at halda skil á so mongum talvum í senn, sigur Rani Nolsøe.

## Flentu at hugskotinum

Ferðin hjá Kasparov kom í lag, eftir at formaðurin í Talvsambandinum hitti Kasparov í Íslandi í fjør.

– Nakað áðrenn høvdu vit sitið í Talvsambandinum og tosa eitt sindur, um tað ikki hevði borið til at gjørt okkurt stórt talvtilak í Føroyum. Tá nevndi onkur, at tað hevði verið stutligt at fingið Kasparov til Føroya. So flentu vit eitt sindur og hildu tað verða fínt hugskot, greiðir Rani Nolsøe frá.

Men tað sum tóktist veruleikafjart fyri mong kom nærri veruleikanum, eftir at Rani Nolsøe fekk samband við Kasparov og umboðsmann hansara undir eini talvkapping í Íslandi.

Alt endaði við, at Kasparov segði seg vilja koma til Føroya.

– Tá eg tosaði við hann í Íslandi, og eg segði, at eg var úr Føroyum, hugsaði hann seg eitt sindur um og svaraði: Føroyar, liggja tær ikki eystanfyri Ísland. Hann er ein sera uppmerksamur persónur, sigur Rani Nolsøe.

– Vit hava fingið eitt sera gott samstarv við vinnulívið, og tað hevur gjørt hetta tiltakið gjørligt. Ikki minst at Føroya Sparikassi vildi verða høvuðsstuðul fyri vitjanini.

## Fekk bilbukt vil Kramnik

Hóast Kasparov ikki í løtuni er heimsmeistari, er tað eingin, sum ivast í, at hann er heimsins sterkasti telvari. Hann hevur júst luttikið í eini sera sterkari kapping í Kasakstan, og her telvaði hann ímóti heimsmeistaranum, Kramnik, í avgerandi talvinum í kappingini.

Kramnik hevur gjørt sær eina tiltikna sterka verjuskipan, sum Kasparov ikk hevur klárað at brotið – fyrr enn nú. Í einum framúr talvi eydnaðist tað Kasparov at bróta sterku verjuna hjá Kramnik og harvið vinna bæði talvið og kappingina.

– Kasparov er tí helst í sera góðum lag, nú hann kemur til Føroya beint eftir hesa kappingina, sigur Rani Nolsøe.

Talvkongurin fer av landinum aftur týsdagin.




# Hevur tú hugflogið...

## ...so hava vit møguleikarnar

Við tí leiðandi fíggjarliga leikluti, sum bankin hevur í tí føroyska samfelagnum, setur tað sera stór krøv til menning og marknaðarføring av bankanum.

Tí verður søkt eftir enn einum skapandi starvsfólki til Menningardeildina.

**Starvið**
Menningardeildin hevur m.a. dagligu ábyrgdina av marknaðarføring - bæði innanhýsis og uttanhýsis - herundir menning av deildum, produktum, tænastum og heimasíðu bankans.

Høvuðsuppgávan hjá tær verður at menna og marknaðarføra produktir og tænastur eins og at arbeiða við grafiskum skipanum.

**Førleikakrøvini**
Tað er ein fyritreyt, at tú:
- hevur útbúgving innan marknaðarføring
- ert opin fyri nýggjum avbjóðingum
- hevur góð samstarvsevni
- kanst starvast sjálvstøðugt

Tað er ein fyrimunur, um tú dugir grafiskar skipanir og dugir væl at málbera teg í skrift og talu.

**Treytirnar**
Setanartreytirnar verða avtalaðar eftir royndum og førleika.

Starvið skal setast skjótast gjørligt, men vit bíða gjarna eftir rætta starvsfólkinum.

**Umsóknin**
Hevur starvið tín áhuga, so send eina skrivliga umsókn saman við viðkomandi skjølum í seinasta lagi 18. juni 2001 til:

P/F Føroya Banka, Starvsfólkadeildin,
Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Joan Stampe, menningarleiðara, á telefon 31 13 50.

FØROYA BANKI


gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Ølneystið er opið so leingi øl er

REPORTASJA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*


*Ølneystið í Klaksvík*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hendan greinin skuldi verið skrivað fyrr í vár, tá myndin varð tikin, tí er kavi uttanfyri, men hon fer kanska allíkavæl at rigga, tí í skrivandi løtu sveipa tjúk hvít kavaæl yvir Norðoyggjar og nú er bara eitt samdøgur til Norðoyarstevnan byrjar.

Vit eru staddir í ølneystinum í Klaksvík, journalistur og myndamaður. Vit standa innanfyri neystadyrnar, ið við sínum rimum geva vánni uttanfyri dæmi at einum málningi, málaður av leitandi listamanni. Uttanfyri svimja æðurnar í góðveðrinum og bryggjurnar eru tómar. Skip og bátar eru úti, tað er fagrasta vártíð.

Tað er fyrrapartur, kalt og er tú ikki beinleiðis hundsjúkur, so eru hetta ikki rættuliga líkindini at sløkkja tostan við ísakøldum gullprýddum Føroyabjór.

– Vit eru ikki so nógvir í morgun, bara tann fasti staburin, men tá línubátarnir eru inni, tá er lív í gauli. Tá kann neystið næstan verða fult og nógvar góðar eru at hoyra, onkur morreyð eisini, sigur ein maður um miðjan aldur. Hann er í einari »ylpø«, sum er heldur tronglig um miðjuna. Eyguni eru blonk og reyðsprongd, tú hómar æðrarnar í tí hvíta. Smáar sveittaperlur hanga fastar á enninum.

– Vit gera ikki hønu halta her inni. Koma bert saman fyri at práta og fáa okkum eina øl. Konufólk eru ikki væl komin sum so og børn sleppa slett ikki inn í neystið, sigur hann.

Og so leggur ein eldri maður upp í. Hann er ikki úr Klaksvík, men er trúgvur gestur í neystinum, tá hann er her um leiðir.

– Eg fati ikki hvat fólk hava í móti hesum neystinum. Kundi eg ikki sita her og drekka mær eina kenning, so sat eg onkra aðrastaðni og høgligt liggur neystið fyri, beint við síðuna av Føroya Bjór, sigur hann.

Og nú leggur so ein heilt annar upp í.

– Eg havi fanin gali meg rinda skatt alt mítt lív, bæði av tí eg havi fortjent á sjónum og sanniliga eisini at tí eg havi drukkið, og tað er slett ikki so lítið millum ár og dag. Landskassin ger tað súrt hjá okkum, sum dáma ein lítlan. Ølið er alt ov dýrt av ølskattinum. Tann sum hevur størst interessu í at fólk drekka nógv í Føroyum, er júst landskassin. Tað hevði verið tómligt í honum, var ongin rúsdrekkaskattur. Tá má vera nakað í tí, sum tikið verður til, at dupultmoralur er dupult so góður. Tí tey, sum hava mest í móti okkum sum drekka, eru júst fólk, sum eru grammast til at kráma pengar til sín úr landskassanum, sigur hesin eini. Hann hevur rættuliga tosað seg heitan, tónalagið er høgt, nú setningurin endar. Ein hómar eitt sindur av beiskleika móti tí heila. Hansara bláreyða nøs næstan hvørvur í hvíta andanum.

## Søtur landroykur

Ein á rennir oman gjøgnum neystið, um summarið luktar hendan illa, siga teir. Inni er skýmligt. Lotið liggur niðan í neystið og ein súrsøtligur angi av gomlum landi hongur í luftini, blandaður saman við royki av ballaðum svørtum og Samson. Sigarettglóðirnar blunka títt. Fram eftir gólvinum, í ovara parti av neystinum, flýtur við hvítum plastberiposum frá Føroya Bjór. Teir eru allir sjálvsagt tómir, tí tómar ølfløskur kunnu aftur umsetast til øl inni hjá Føroya Bjór, og tað er ølið íð savnar menninar í neystinum.

Ølneystið, sum Føroya Bjór eigur, er ikki serliga væl umtókt í Klaksvík av øðrum enn teimum sum brúka hetta, og teimum sum vinna pening uppá hetta.

Fyri mong í Klaksvík er hetta tað reinasta blasfemi, at neystið verður nýtt til brennivínsbørnini, verður hugsað um hvat virksemi neystið varð nýtt til fyri eini 50 árum síðan. Tá stóð navnframi trúboðarabáturin »Sendebudet« í neystinum, tá hann ikki var á mannaveiðu í bygdunum kring Klaksvíkina og í eystara parti av Eysturoynni.

Andaliga støðan var vánaligt fyri fimti árum síðan, í hesum mangan stokkkonservativu kirkjubygdum, var andslívið sovnað av gomlum vana. Kappar við lúnningina á Betestha, menn sum Jógvan Gerðalíð og Páll á Dul, andans stríðsmenn av Guds náði, og aðrir, ferðaðust runt við »Sendebudet« og sáddu og fleiri staðni gav ávøkst. Fleiri eru samkomunar, sum stava beinleiðis frá virkseminum hjá »Sendebudet«.

Í dag er »Sendebudet« burtur úr neystinum, einasta leivd frá hesum tíðarskeiði er spælið, sum stendur rustað og tært innast í neystinum, næstan undir í ølposum.

Forrestin, tað er vanliga ikki so óruddiligt í neystinum. Men seinastu tíðina hevur Jørgen, grønlendari, ein raskur maður, sum hevur búð og siglt ein stóran part av ævini úr Klaksvík, verið í øðrum ørindum í Havn. Og menninir í neystinum sakna hann. Tað er Jørgen sum hugnar um í neystinum.

Vit práta leingi um alt millum himmal og jørð, um fisk, um hundasjúku, um samfelagið og kjerligheit og missa kjerligheit. Um gyltar farnar dagar og um vónloysi fyri framman. Menn koma alsamt í neystið og aðrir fara til hús.

Teir flestu av fasta stabinum eru einsamallir. Drekkur tú dagliga, so hevur tú líkasum ikki stundir til annað enn at drekka og heldur ikki familjulív. Tú hómar tár í eygunum, tá tosað verður um syndraðar familjur og børn, og svikt og sorg og alt sum ein ikki megnaði, tí kenningin hevði fingið valdi á einum.

Men sorgarleikurin og vanlagnan hvørvur í næstu løtuni, tá næsta ølin er komin niður um og so hoyra vit fleiri søgur frá ungum sorgleysum døgum, tá ein kundi drekka tað ein vildi, tá konufólk linkaðu í knøunum bara ein vísti seg, og brøgdini á skipsdekki søgdu frá monnum.

Teir flestu av fasta stabinum í ølneystinum Klaksvík verða vaktir á hálvari nátt av berum tosta og nívandi ótta. Føroya Bjór letir ikki upp fyrr aðrir haldlar og tað er hart, í herviligum sveittaherindum, at bíða eftir at løtan er komin, tá øl í neystinum kann bjarga einum eina løtu burtur úr allari neyðini.

Sjálvt um neystið veðrur brúkt av øðrum, so er tað fyrst og frest eitt friðskjól fyri rúsdrekkabundnum í Klaksvík, ið enn ikki duga at síggja sær annan veg burtur úr elendigheitini.

Sætt í ljósinum á hesum, so er enn nytta í gamla neystinum hjá »Sendebudet« og tað fortjenar eitt sindur størri viðurkenning millum manna.

# Nýtt skeið til alivinnuna

**Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hevur ovmikið at gera, og um eina viku hava teir fyrsta skeiðið fyri fólk í alivinnuni**

TRYGD
*Eyðun Klakstein*


*Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hevur úr at gera við at skipa fyri trygdarskeiðum av ymsum slagi*

**Klaksvík:** Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hevur higartil í ár havt eins nógv fólk á skeiði, sum teir høvdu alt árið í fjør.

Nógv sjófólk eru til vanligu trygdarskeiðini, men Trygdarmiðstøðin hevur eisini fleiri onnur skeið á skránni.

Nýggjasta skeiðið er eitt fyri fólk í alivinnuni. Hetta skeiðið verður fyrstu ferð hildið um eina viku, og kann fara at gerast eitt afturvendandi skeið.

Skeiðið fyri fólk í alivinnuni er lutvíst eitt vanligt trygdarskeið, men dentur verður lagdur á viðurskifti, sum serliga eru galdandi í alvinnuni. Skeiðið er gjørt í samstarvi við SINTEF í Noregi.

Trygdarmiðstøðin umhugsar at skipa fyri øðrum skeiðum eisini, og møguliga verður í framtíðini skipað fyri skeiðum fyri fólk, sum arbeiða í ávísum vinnum á landi.

Trý fólk eru í føstum starvi á Trygdarmiðstøðini, men harafturat undirvísa eisini aðrir tímalærarar á skeiðunum.